## Lars-Emil misnøgdur

Grønlendski fólkatingsmaðurin Lars-Emil Johansen er ónøgdur við, at hinir báðir limirnir í Norðuratlantsbólkinum, Juliane Henningsen og Høgni Hoydal, hava broytt bygnaðin í bólkinum. Broytingin er, at nú skulu limirnir hava sín skrivara, og tað heldur Lars-Emil Johansen vera óheppið. Hann sigur ttó við KNR, at hann heldur fram í bólkinum, men at hann fer at arbeiða tættari saman við Sosialdemokratunum í framtíðini.



*Lars-Emil Johansen hellir nú meiri til Sosialdemokratarnar í Fólkatinginum*
*(Mynd: KNR)*

## Góðtaka ikki kjarnorku

Norski umhvørvisfelagsskapurin Bellona heldur lítið um ætlanina hjá russum at brúka kjarnorku til at útvega oljuútbúnaðinum í Barentshavinum orku. Frederic Hauge, sum er formaður í Bellona, sigur við NTB, at StatoilHydro eigur at taka seg burtur úr samstarvinum við russar í Barentshavinum, um russar gera álvara av kjarnorkuætlanini. Leiðslan í StatoilHydro hevur annars avsannað, at ætlanin er at brúka kjarnorku í Barentshavinum.

# Andstøðan leggur til brots

**Beinanvegin nýggja Løgtingið fer til arbeiðis í morgin, er andstøðan til reiðar við fleiri uppskotum og fyrispurningum**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Andstøðan ætlar at koyra hart á samgonguna í Løgtinginum, og leggur til brots beinanvegin*

Nú nývalda Løgtingið fer til arbeiðis av álvara í dag, er tað longu greitt, at andstøðan ætlar ikki at liggja á tí latu síðuni.

Løgtingsfundur verður í morgin og andstøðan er longu klár við fleiri uppskotum at leggja fyri tingið og tey eru eisini klár við fleiri fyrispurningum til tey nývaldu landsstýrisfólkini um ymisk viðurskifti.

Eitt eymt mál í langa tíð, hevur verið spurningurin um dagpening fyri at verða heima hjá sjúkum barni frá fyrsta sjúkradegi.

Nú leggur andstøðan í felag uppskot fyri Løgtingið um hetta. Talan er um eitt uppskot, sum undanfarna samgonga eisini legði fram, men sum fall burtur, tá ið valið varð útskrivað.

Andstøðan sigur, at skipanin, sum undanfarna samgonga ætlaði at seta í verk, var alt ov dýr í umsiting og tí mælir hon til, at talan verður um eina skipan, sum arbeiðsgevararnir sjálvir umsita.

Skipanin skal eisini verða galdandi fyri tímalønt.

### Sjúklingar betri rættindi

Men harafturat ætlar Sjálvstýrisflokkurin at økja um rættindini hjá sjúklingum, ið fara uttanlands í viðgerð, at fáa fylgjara við sær.

Eftir lógini, sum nú er í gildi, eru tað bara foreldur ella hjúnafelagi hjá sjúklingunum, sum fáa dagpening, tá ið tey fara við honum til viðgerðar uttanlands.

Tí eru sjúklingar, ið hvørki eiga foreldur ella hjúnafelaga, fyri vanbýti, tí tey fáa ikki rætt at fáa fylgja við sær, hóast tey eru álvarsliga sjúk og tað vil Sjálvstýrisflokkurin hava broytt.

### Privatir varðveita tunnilin

Teir tríggir andstøðuflokkarnir, Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, fara eisini at leggja uppskot fyri Løgtingið um at játta 650.000 krónur til ráðgeving, so at vinnumálaráðið kann fara í samráðingar við privata felagið, sum hevur gjørt ætlanina um Skálafjarðartunnilin fyri at fáa semju við felagið um at gera tunnilin.

Afturat hesum trimum málunum, ætlar andstøðan eisini at leggja uppskot fyri Løgtingið um at longja flogvøllin í Vágum meiri enn upp í teir 1600 metrarnar, sum talan higartil hevur verið um og sum tað sæst í aðrari grein her í blaðnum fer Sjálvstýrisflokkurin at leggja uppskot fyri Løgtingið um at víðka javnstøðuhugtakið til at umfata allan mismun yvirhøvur.

Fólkaflokkurin fer eisini at leggja uppskot fyri Løgtingið um at byggja eftirskúlan í Hvalba beinanvegin.

Umframt hesi uppskotini, er eisini ætlanin at spyrja nývaldu landsstýrisfólkini um ymisk viðurskifti. Vit hava longu greitt frá í Sosialinum, at Kári P. Højgaard, ætlar at spyrja Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í lógarmálum, um viðurskiftini hjá útlendingum í Føroyum.

Men hann ætlar eisini at spyrja Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, um deildirnar hjá Tolli og skatti í Eysturoy ella Norðoyggjum.

Í hesum sambandi vil hann hava at vita um hann fer at halda fast um ætlanina at deildin í Norðoyggjum og deildin í Saltangará, skulu latast aftur, so at ein nýggj deild kann latast upp í Gøtudali.

Somuleiðis vil hann eisini hava greiði á, um nakað er í seiglívaðum leysasøgum um, at deildin hjá Toll og Skatt í Saltangará ikki flytur í Gøtudal, men skal flytast heilt til Klaksvíkar.

# Hjálpa fólki ið eru fyri mismuni

**Javnstøða má verða til annað og meiri enn12 at telja, hvussu nógv konufólk eru í almennum nevndum, sigur Kári á Rógvi, nývaldur tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin. Hann leggur nú uppskot fyri Løgtingið um at gera ein stovn, sum skal hjálpa øllum, sum eru fyri mismuni, bæði konufólki, mannfólki, brekaðum, útlendingum og børnum**

MISMUNUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Kári á Rógvi heldur, at vit mugu fáa ein stovn, sum líkist løgtingsins umboðsmanni, sum skal tryggja rættindini hjá fólki, sum eru fyri mismuni vegna kyn, brek, uppruna og aldur*

Hugtakið Javnstøða má fevna um annað enn bara at telja, hvussu nógv konufólk eru í ymsum almennum nevndum

Tað heldur Kári á Rógvi sum hevur verið formaður í javnstøðunevndini í nøkur ár.

Hann heldur ikki, at arbeiðið fyri javnstøðu virkar nóg væl og nú hann eisini er nývaldur løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, ætlar hann sær at gera nakað við hendan spurningin.

Tí fer hann nú at leggja uppskot fyri løgtingið um at víðka heimildirnar hjá javnstøðunevndini og at geva henni størri heimildir.

Hann mælir sostatt til, at vit gera ein stovn, sum skal hjálpa øllum, sum eru fyri ógrundaðum mismuni í øllum samfelagsviðurskiftum, serliga á arbeiðsmarknaðinum.

- Talan kann vera um mismun vegna kyn, aldur, brek ella uppruna.

Hann í hesum sambandi, at tað er sjálvsagt, at ein slíkur stovnur røkir áhugamálini hjá brekaðum

- Ein yvirlýsing um rættindini hjá brekaðum er á veg og tí er tað neyðugt at hava ein stovn, sum hevur eftirlit við teimum viðurskiftunum, heldur hann.

Men tað er eisini sjálvsagt, at ein slíkur stovnur tryggjar rættindini hjá útlendingum í Føroyum, tí tað eru nógvir útlendingar í Føroyum, sum hvørki vita út ella inn og sum ikki vita, hvørji rættindi tey hava.

- Hetta verður átrokandi, nú meiri og meiri verður tosað um at fáa útlendska arbeiðsmegi í størri mun til Føroya.

Samstundis heldur hann, at tað er neyðugt, at ein slíkur stovnur, eisini arbeiðir fyri at tryggja rættindini hjá børnum og fylgir við, tá ið dagstovnar og skúlar verða bygdir.

- Talan skal verða um ein stovn, sum tryggjar yvirskipaðu rættindini hjá børnum, men sum eisini samstarvar við barnaverndir og aðrar stovnar, sum hava við rættindini hjá børnum at gera.

Kári á Rógvi heldur, at tað er rætt at samskipa allar hesar uppgávurnar í ein stovn, tí tá ið talan er um mismun, er talan ofta um blandingsmismun. Tað merkir, at fólk eru fyri mismuni, bæði tí tey eru konufólk og tí tey eru útlendingar, fyri at nevna eitt dømi.

Hann heldur sostatt, at tað er skeivt at skipa fleiri nevndir og stovnar at taka sær av hesum viðurskiftum og tí vil hann hava øll hesi viðurskifti savnað undir sama hatti, har ein umboðsmaður, ið líkist løgtingsins umboðsmanni, tekur sær av teimum dagligu viðurskiftunum, men har ein nevnd stingur tað yvirskipaðu kósina út í kortið.

Hann metir, at tað fer at kosta tvær milliónir um árið at skipa ein slíkan stovn, men hann heldur, at peningurin er givin væl út, tí fyri búskapin hevur tað alstóran týdning, at alt okkara menniskjansliga tilfeingið verður brúkt til fulnar.